## Ísraelsk tennis-søga

Tað hevur vakt ans, at Ahahar Peer í næstum tekur lut í Quatar Open. 20 ára gamla Peer er nevnliga úr Jerusalem, og óalmenni politikkurin hevur altíð verið, at ísraelittar ikki taka lut í kappingum á arabisku hálvoynni. Og hóast nógv rok hevur verið um avgerðina, so nervar hetta ikki spælaran sjálvan. – Eg eri her fyri at spæla tennis. Men um tað letur upp fyri, at næsta ættarliðið av arabarum og ísraelittum fara at arbeiða fyri friði, verið eg fegin, sigur Peer við Daily Telegraph.



## Vermamman bjargaði felagnum

Tað kravdi trygd í húsunum hjá vermammuni, tá Barry Fry vildi bjargað Peterborough frá at fara á húsagang í 2006. Fry hevði sjálvur sprænt nógvan pening í felagið, men hetta munaði ikki nóg nógv, og tá hann ikki megnaði at veita trygd fyri fleiri lánum, veðsetti hann húsini hjá vermammuni. – Tað var mikið lætt. Eg segði einki sum helst við hana, sigur Barry Fry um støðuna, sum ivaleyst kuni skapt rok í heiminum. Fry er í dag ítróttastjóri í Peterborough.

Neistin-StÍF 22-20 (9-9)

# Skiftandi black-out

**Sjáldan hevur dystargongdin verið meira skiftandi, enn hon var tað í kvinnudystinum á Hálsi sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mótgongdin hjá Neistanum hevur verið tung seinastu vikurnar. Og hon tóktist bara standa við sunnudagin.

Eftir fyrstu 10 minuttirnar av dystinum móti StÍF stóð 1-6 á máltalvuni, og eitt Neistalið uttan sjálvsálit tóktist vera púrasta í upployspn.

Eitt time-out bøtti tó munandi um støðuna. Neistin var aftur at hóma hjá Neistanum, og nú vóru tað hvítu gestirnir, sum fóru púrasta í svart. Næstu 26 minuttirnar fekk StÍF bara trý mál, og alt líktist einum veruligum stórsigri, har tær bláu veruliga skuldu seta tingini upp á pláss.

Men heldur ikki hetta helt sær. StÍF raknaði spakulia við, og so líðandi ótu tær seg inn aftur í dystin. Hóast Neistin við mansverju av Rebekku Justinussen hevði tikið broddin av stranda-álopinum, so vildu tær hjá StÍF ikki geva seg, og tá tær brádliga eksploderaðu við fýra málum á rað var sigurin aftur í nánd.

Neista-venjarin hevði tá í góða løtu hildið Nicoletu Radu Hansen á beinkinum. Avrik hennara hevði kanska ikki verið tað besta hendan dagin, men túrurin á beinkinum broytti eisini hetta. Fult tendrað kom, sá og sigraði Nicoleta seinastu løtuna, og við trimum málum á rað kundi Neistin soleiðis toga sær stigini til høldar.

Hvussu langt stigini røkka, ber illa til at siga. Og tað verður neyvan til finalupláss. Men fyrst og fremst mundi sigurin vera eitt tiltrongt sálarligt lyft hjá liðnum, og í øðum lagi bendir alt á, at bronsumerkini við hesum eru tryggjað.

Hjá StÍF var ætlanin helst at beina seinasta niðurflytingarvanda av vegnum, men tann parturin má so bíða eina løtu afturat



*Við sigrinum á StÍF helt Neistin fast um bronsumerkini. Og kanska eisini um vónina um eitt pláss í FM-finaluni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

**Neistin-StÍF 22-20 (9-9)**
10 min: 1-6
20 min: 6-7
40 min: 15-11
50 min: 19-17
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 5, Unn J. Kragesteen 4(1), Anja Heinadóttir 4, Elin Stakksund 3, Ása á Neystabø 3, Rakul Magnussen 2, Rakul Augustinussen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 7(3), Rósa Johansen 5, Fríðrún Danielsen 4, Ninna K. Johansen 2, Oddrún Danielsen 1, Bára B. Danielsen 1
**Brotskøst:** Neistin 3, StÍF 3
**Útvísingar:** Neistin 3
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomasen

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 446 | 339 | 107 | 27 |
| 2 VB | 14 | 9 | - | 2 | - | 3 | 333 | 290 | 43 | 20 |
| 3 Neistin | 14 | 8 | - | 0 | - | 6 | 338 | 329 | 9 | 16 |
| 4 Kyndil | 15 | 5 | - | 1 | - | 9 | 342 | 385 | -43 | 11 |
| 5 StÍF | 15 | 4 | - | 1 | - | 10 | 337 | 380 | -43 | 9 |
| 6 VÍF | 15 | 2 | - | 1 | - | 12 | 325 | 398 | -73 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 15 | 12 | - | 1 | - | 2 | 438 | 356 | 82 | 25 |
| 2 Neistin | 15 | 9 | - | 1 | - | 5 | 430 | 408 | 22 | 19 |
| 3 Kyndil | 15 | 8 | - | 0 | - | 7 | 404 | 408 | -4 | 16 |
| 4 VÍF | 15 | 6 | - | 2 | - | 7 | 407 | 424 | -17 | 14 |
| 5 H71 | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 379 | 380 | -1 | 13 |
| 6 KÍF | 15 | 1 | - | 1 | - | 13 | 360 | 442 | -82 | 3 |

## Forsetin tekur við afturvali

**Fýra starvsnevndarlimir hjá FSF standa fyri valið á aðalfundinum, sum verður 1. mars. Allir taka teir við afturvali**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá FSF verður nú boðað frá, at Óli Holm, forseti, Rúni Heinesen, Magnus á Stongum og Høgni í Stórustovu allir taka við afturvali.

Á heimasíðuni verður somuleiðis sagt, at starvsnevndin er samd um at stuðla afturvalinum av teimum fýra.

Enn er ikki greitt, um nøkur mótvalevni verða til sitandi nevndarlimir. Fyri tveimum árum síðani royndi Birgir Enghamar, sum nú er formaður í HB, at koppa sitandi forsetanum, men atkvøðugreiðslan endaði við javnleiki, og tí kundi Óli Holm halda fram í sessinum.



*Saman við Rúna Heinesen, Magnusi á Stongum og Høgna í Stórustovu sigur FSF-forsetin seg taka við afturvali til komandi aðalfundin hjá FSF*